

# 435 milliardir í grønlendska oljugrunninum í 2060

**Jan Müller**

19.02.2014 - 09:22

Oljan.fo

Hóast ein nýggj serfrøðingafrágreiðing sigur nakað annað, heldur grønlendski landsstýrismaðurin í tilfeingismálum fast um, at framleiðsla verður á landgrunninum um fá ár, og at oljan fer at geva nógvar milliardir og fer at gera grønlendingar ríkar. Tað skrivar hann í einum tíðindaskrivi.

Metingin hjá Jens -Erik Kirkegaard, landsstýrismanni, er, at sjálvt um Grønland skal rinda fyri danska blokkstuðulin, tá oljan fer at geva pengar, verða 435 milliardir krónur í grønlendska oljugrunninum í 2060.

Tað eru bara fjúrtan dagar, síðani ein serfrøðinganevnd við jarðfrøðinginum Mimi Rosing á odda kunngjørdi, at tað er ikki sannlíkt, at tey hørðu evnini í grønlendsku jørðini kunnu geva grønlendingum ein sjálvberandi búskap. Nevndin vísti í hesum viðfangi á, at við tí

verandi almenna tænastustøðinum og blokkstuðulinum frá dønum resta 800 milliónir krónur í á hvørjum ári.

**Serfrøði onga ávirkan**

Kortini heldur Jens-Erik Kirkegaard fast um sítt bjartskygni. Hann sigur seg vera sannførdan um, at grønlendingar fara at hava 435 milliardir krónur í oljugrunninum um 45 ár, hóast tann danski blokkurin upp á 3,5 milliardir um árið krónur hvørvur. Landsstýrismaåðurin sigur, at ávaringin frá Mimi Rosing og hinum serfrøðingunum ávirkar ikki tilfeingispolitikkin hjá landsstýrinum.

Serfrøðinganevndin skrivaði í sínari frágreiðing, at oljuvinna í Grønlandi liggur millum 20 og 50 ár úti í framtíðini. Men tað heldur Jens-Erik Kirkegaard ikki. Hann væntar, at annaðhvørt ár verða ein ella tvær boriverkætlanir settar í verk, og at í 2020 fer ein lítil pallur at vinna olju av einari leið við 500 milliónum tunnum. Fimm ár seinni verður talan um ein stóran pall á einari leið við tveimum milliardum tunnum, skrivar landsstýrismaðurin